# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**
19. desember fingu Heidi og Eli Guttesen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3500 gr.

30. desember fingu Halla Seyer Johannesen og Pauli Johannesen, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3770 gr.

2. januar fingu Kristianna Torkildshøj og Fróði Sigvardsen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3900 gr.

4. januar fingu Marita Samson Sigurdardóttir og Mortan Sólheim Thomsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4600 gr.

4. januar fingu Elsibeth Jacobsen og Geir á Lofti, Sandavágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3325 gr.

5. januar fingu Lena Reinert og John Mikkelsen, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3500 gr.

5. januar fingu Birgit Beder og Bjarni Nielsen, Miðvágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3100 gr.

6. januar fingu Bodil og Jákup Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3150 gr.

**Prógv**
Á Fonn flog í Klaksvík hevur Bodil Jacobsen í dag 9. jan 2009 lokið skrivstovuútbúgving við serligum atlitið til ferðavinnu.

Tann 16. desember 2008 hevur Marit Mortensen, Argir, lokið prógv á Leeds University sum Master of Science í Exploration geophysics.

**70 ára føðingardagur**
Í dag, 9. januar verður Finnbogi við Gjónna, Fuglafjørður, 70 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 10. januar í Lonini í Fuglafirði kl. 18.00 har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Tann 4.12.2008, *giftust* Asta F. Hjelm, Tórshavn og Oluf í Toft, Leirvík.

Leygardagin 03.01.09 *giftust* í Skála kirkju, Maria í Króki, Strendur og Magni Joensen, Skála.

Leygardagin 10.1.2009 kl 16.00 giftast í Sørvágs kirkju Anna Elisa Jacobsen og Hallur Berg Sørvágur. Veitslan verður fyri innbodnum í SÍF húsinum frá kl. 19.00.

Fyri 25 árum síðan:

# Ólavur Gregersen á Flesjarnar

Farmaskipið hjá P/f Drekanum í Gøtu, Ólavu Gregersen, rendi á flesjaranar um tvey tíðina um náttina tann 10. januar. Skipið hevði verið í Klaksvík og var á veg inn á Runavík, tá tað fór av kós og rendi á Flesjarnar.

Manningin, sum taldi níggju mans, varð sjórað umborð á vaktarskipið Ólav Halga, sum var komið til hjálpar. Manningin varð sigld til Havnar. Skipið sakk nakar dagar seinni.

Ólavur Gregersen var nýggjur, hann varð bygdur á Skála Skipasmiðju at 12. oktober 1982.

*Kelda: Sosialurin 12. januar 1984*





*Farmaskipið Ólavur Gregersen stendur á Flesjunum*




# Prógv

Snorri Danielsen tók 2 bachelor útbúgvingar:
Bachelor of Arts (B.A.) degree with major in History
Bachelor of Science Degree with major in International Business

Sámal Jakobsen:
Bachelor of Science (B. S.) degree with major in Biology

Sámal byrjaði í januar 2009 á St. George´s University á Grenada í Karibien at lesa til lækna (MD -Doctor of Medicine). Verður liðugur í 2012.

Snorri fer vænti yvir aftur til USA í september í 2009 at byrja uppá eina masters útbúgving.



LØGMANSSKRIVSTOVAN

## Reingerðarstarv í Løgmansskrivstovuni

Reingerðarstarv í Løgmansskrivstovuni er leyst at søkja við freist fríggjadagin 23. januar 2009.

Les meira á www.tinganes.fo undir Størv.

Løgmansskrivstovan veitir løgmanni ráð og tænastur í sambandi við uppgávur løgmans at stjórna landsstýrinum, og hevur ábyrgd av at fyrireika og fremja uppgávur, sum løgmaður hevur sambært stýrisskipanini.